**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 03. nov. 2011**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels O. Eyvindsson,
Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til átakið "Í menniskjum góður tokki".** | Til 1:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 2.500,-. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um fíggjarligan stuðul frá sluppini "Johanna TG 326".** | Til 2:<br>Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 25.000,-. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul til ferð frá Heilafelagnum.** | Til 3:<br>Samtykt varð ikki at stuðla hesum. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um stuðul til dokumentarfilm um "Kolasøguna í Suðuroy".** | Til 4:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 25.000,-. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn um stuðul til nýggjárshald í Nesi.** | Til 5:<br>Samtykt varð at stuðla teimum við kr. 5.000,-. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv um stuðul við keyp av bókini "Havið tók teir" hjá Óla Jacobsen.** | Til 6:<br>Samtykt varð at stuðla við keyp av 12 bókum. |
| **Mál 7:**<br>**Skriv frá Hvalbiar skúla um rindan av móttøku í sambandi við at Maja Schrøter fer frá sum lærari.** | Til 7:<br>Samtykt varð at rinda fyri hesa móttøku. |
| **Mál 8:**<br>**Skriv viðv. Revatrøðini, matr. nr. 51a í Hvalba.** | Til 8:<br>Samtykt varð at kanna málið nærri viðv. prísi til komandi fund. |

| | |
|---|---|
| | |

| | |
|---|---|
| **Mál 9:**<br>**Skriv frá umboði fyri smábátaeigarar í kommununi um fund.** | Til 9:<br>Samtykt varð at gera eina roynd at hava almenna fundin fríggjadagin tann 2. des. 2011 kl. 16.00. |
| **Mál 10:**<br>**Skriv um meirútreiðslur av skúlabarnaflutningi.** | Til 10:<br>Í sambandi við umvælingina av Hvalbiar skúla er meira koyring. Samtykt at gjalda henda meirkostnað. |
| **Mál 11:**<br>**Spillivatnsætlanin.** | Til 11:<br>Liðug spillivatnsætlan við raðfesting av arbeiðinum varð framløgd. Samtykt varð at góðkenna ætlanina. |
| **Mál 12:**<br>**Fyrsta viðgerð av fíggjarlóg fyri 2012.** | Til 12:<br>Útreiðslurnar til rakstur eru settar til kr. 16.030.500,- og íløgurnar kr. 9.650.000,-. Samtykt varð at skattaprosentið framhaldandi verður 20%. |
| **Mál 13:**<br>**Tilboð og tilmæli frá Magn viðv. Hvalbiar skúla.** | Til 13:<br>Mælt verður til, at 40 ára gamli ketilin verður útskiftur við lágorkuketil. Samtykt varð at keypa nýggjan ketil. |
| **Mál 14:**<br>**Skriv frá Niels Jacob Thomsen um nevndarsessir.** | Til 14:<br>Niels Jacob boðar frá, at hann sigur seg úr Fíggjarnevndini og Vega- og Havnanevndini. Trygvi Midjord verður limur í Fíggjarnevndini - Herdis Jensen verður eyka. Í Vega- og Havnanevndina kemur Martin í Nesi inn ístaðin - Rúni Thomsen verður eyka. |
| **Mál 15:**<br>**Skriv frá Niels Jacob Thomsen um neystagrundir í Nesi.** | Til 15:<br>Viðv. útbjóðingartilfarinum uppá neystagrundir, varð samtykt, at Vega- og Havnanevndin kannar hetta hjá HMP Consult. |